VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Miðsavnan um vit vilja tað ella ikki

Bygdamenning hevur leingi verið frammarlaga í almenna orðaskiftinum í Føroyum. Nú verður tað nevnt miðspjaðing. Hvussu kunnu vit framhaldandi stýra og skipa menningina í hesum landi, soleiðis at hon kemur øllum búplássum til góða. Hetta hevur verið afturvendandi spurningurin í kjakinum í fjølmiðlunum og á tingi.

ÚF setti spurningin á skránna nú um dagarnar við eini sera áhugaverdari sending, har Gunnar Nolsøe tosaði við samfelagsfrøðingin Sámal Matras Kristiansen.

Sendingin snúði seg um, hvussu demografisku Føroyar síggja út í framtíðini. Also hvussu búsetingarmynstrið og menningin fer at laga seg sum árini ganga.

Um gløggu analysurnar hjá samfelagsfrøðinginum fara at halda ella ikki skulu ikki vit gera okkum til dómarar yvir, men tær kendust sera beinraknar. Niðurstøðan tóktist vera hon, at líka mikið, hvat vit hugsa, siga og gera, so slepst ikki undan eini framhaldandi miðsavnan, har høvuðsstaðurin saman við parti av Eysturoynni serstakliga verður dragandi magneturin fyri búseting og menning.

Samfelagsfrøðingurin metti, at útoyggjarnar og útjaðarin gerast taparin soleiðis at skilja, at tey ungu flyta og arbeiðsplássini fækka. Vit fáa størri og meira savnandi eindir eitt nú á skúlaøkinum. Úrslitið verður, at hesi búplássini, sum longu merkja afturgongdina og fráflytingina, fara at gerast summarhúspláss hjá fólki, sum búgva t.d. í miðstaðarøkinum ella øðrum stórplássum.

Spurningurin er so, um vit eru før fyri at steðga negativu gongdini í Sandoynni og Suðuroy. Her metti samfelagsfrøðingurin, at vit neyvan fáa nakran tunnil í Sandoynna í bræði, og tunnil til Suðuroyar kunnu vit skjóta ein hvítan píl eftir. Pengar verða ikki til tað. Verður ikki okkurt heilt serstakt gjørt fyri at menna Suðuroynna, so fær hon somu lagnu sum aðrir útjaðarar. Og soleiðis sum búskaparstøðan verður metti hann ikki, at ráðini verða til at gera nógv meira fyri Suðuroynna heldur.

Áhugavert var at hoyra ærliga samfelagsfrøðingin gera greitt, at menningin í Føroyum í framtíðini fer í nógv størri mun at verða bundin av, hvat vit hava ráð til. Tí fara vit neyvan at hava ráð til at varðveita funktiónir kring landið út frá tí at varðveita arbeiðspláss. Umstøðurnar fara at krevja av okkum, at avmarkaðu pengarnir mugu umsitast og brúkast optimalt tvs. at vit mugu fáa sum mest burtur úr hvørjari skattakrónu. Tá verður ikki pláss fyri at tosa um bygdamenning út frá gomlu terminologiini, har flakavirki skuldi vera á hvørjum tanga, barnaskúli í hvørjari bygd og sjúkrahús í fleiri plássum osfr.

Hvat vit enn halda um alt hetta, so svitast ikki, at vit við avmarkaðu skattakrónunum eru noydd at skipa íløgur og rakstur soleiðis, at allir føroyingar fáa sum mest burtur hvørjari skattakrónu. At tænasturnar eru góðar og tryggar. At vit ikki hava ráð til dupultfunktiónir men mugu tryggja, at tær lívsneyðugu funktiónir, sum bera vælferðarsamfelagnum uppi, eru tær best hugsandi ella so góðar til ber.

Sosialurin

Valdømi og javnstøða

KRISTIANNA WINTHER POULSEN
forkvinna í Javnstøðunevndini

Formansskapur løgtingsins hevur ikki havt javnstøðu millum kyn í huga, nú stig eru tikin til at endurskipa Føroyar í fleiri valdømi. Orsøkin er sambært stigtakarunum vandin fyri, at politiska umboðanin av øllum landsins íbúgvum verður órættvís, um Føroyar framhaldandi skulu vera eitt valdømi, tí at so verða møguleikarnir hjá fólki í útjaðaranum og ókendum fólki at verða vald á ting at kalla eingir.

Hugsanarhátturin

Tað er skilligt, at stúrt verður fyri, at einki umboð fyri fólk í útjaðaranum verður valt á ting. Tí tað er óheppið fyri eitt samfelag, at bert ein avmarkaður partur av fólkinum er umboðaður í tinginum. Spurningurin er so, hvussu til ber at skipa seg, so at tingið verður so breitt umboðandi sum gjørligt.

At betra um møguleikarnar hjá borgarum í øllum landsins økjum at verða vald á ting, er ein hugsanarháttur. Ein annar hevði verið at betra um møguleikarnar hjá báðum kynunum at verða vald á ting. Og tað hevði verið hóskandi, at uppskotið til nýggja valskipan, sum formansskapurin hevur umbiðið frá serfrøðingum, eisini fevndi um nakrar tankar um økta javnstøðu millum kyn, serliga um vit hugsa um, hvussu nógv hesin spurningur hevur fylt í almenna orðaskiftinum seinastu árini. Men almenna orðaskiftið er eftir øllum at døma ikki áhugavert fyri løgtingsins formansskap.

Verjir skipanin seg sjálva?

Tíverri tykist formansskapurin ikki leggja í, at helvtin av landsins íbúgvum ongantíð hava verið umboðaðar í løgtinginum á nøktandi hátt. Hví so er, kunnu vit allarhelst skifta orð um hetta til dómadags, men veruleikin er, at 100 ár eftir, at bæði kynini fingu valbæri og valrætt, vórðu 7 konur og 26 menn vald á ting í januar 2008. Og at endurskipa samfelagið í fleiri valdømi verður allarhelst ein dyggur smeitur fyri økta javnstøðu á tingi. Men hetta er kanska ætlanin? At varðveita heilagu grøvina og egið livibreyð?

Fleiri valdømi

Við fleiri valdømum fær hvør flokkur neyvan meira enn eitt umboð valt í teimum smærru økjunum. Og at hetta umboðið verður í kvennkyni, er lítið sannlíkt, um vit hugsa um verandi profilar hjá flokkunum kring landið. Útlitini kunnu sostatt gerast, at nakrar konur koma inn í Suðurstreymoy, sum sambært uppskotinum, ið formansskapurin hevur bílagt, fær 12 tinglimir, meðan talið av valdum konum í hinum valdømunum verður sera lágt.

Møguleikarnir

Vónandi vísa okkara 28 tingmenn og 5 tingkonur, at tey eisini í verki ynskja økta javnstøðu í føroyska samfelagnum, og taka beinleiðis atlit til javnstøðu í eini nýggjari valskipan. Hetta kann gerast við kvoteringum, ið fevna um bæði geografi og kyn, við at varðveita eitt valdømi ella við onkrum heilt triðja møguleika. Men týdningarmikið er, at hesin spurningur verður umrøddur.

25. januar 2010

Lóggeva kvinnur úr løgtinginum

EYÐGUNN SAMUELSEN
tingkvinna, Javnaðarflokkurin

Við seinasta løgtingsval øktist kvinnuumboðanin á tingi við meira enn 100 prosentum. Frá trimum kvinnum til at sjey kvinnur vórðu valdar. Hevði tá ta fatan, at flest øll mettu hetta vera eitt framstig.

Hvør ið orsøkin var til hesa framgongd ber ikki til at siga við vissu, tí ongin kanning er gjørd. Okkurt kundi bent á, at eitt valdømi var ein av orsøkunum til hetta framstig. Tó ivist eg ikki í, at Demokratia og tað arbeiðið, ið hesin felagsskapur gjørdi, eisini var ein av orsøkunum.

Við at hyggja at valtølunum síggja vit at kvinnurnar, í ein rættuliga stóran mun, hava fingið atkvøður um alt landið. Tað kann vera ein ábending um, at eitt valdømi fremur kvinnuumboðanina. Heldur ikki hetta er kannað.

Fleiri valdømir

Nú ætlan, eftur øllum at døma, er um at skipa landið aftur í 5-7 valdømir, dugi eg ikki at ímynda mær, at uppskotið ikki tekur atlit til kvinnuumboðanina. Tað kann ikki vera rætt, at ætlanin er at lóggeva aftur til eina skipan, ið hevur ta avleiðing, at kvinnurnar á løgtingi aftur fara at fækka í talið.

Kann heldur ikki hugsa mær, at nakar politikari veruliga vil koma við einum tílíkum uppskoti. Gallup kanningin, ið Demokratia gjørdi, vísti, at ein stórur meiriluti av Føroya fólki tóku undir við, at vit skulu hava fleiri kvinnur á ting. Tað er mín sannføring at eitthvørt uppskot til broytingar í valskipanini má taka atlit til henda spurning, um uppskotið skal verða tikið í álvara.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.